# Aksel Olsen: 91 ára gamal veljari



*Aksel Olsen var elsti veljari, sum vitjaði valstaðið í Nes kommunu týsdagin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

KOMMUNUVALIÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Valdagurin er ein hugnaligur dagur. Hann kann síggjast í ymiskum ljósi – alt eftir, hvar tú ert staddur í rokanum, sum er hendan dagin. Ert tú valevni ella áhugaður í valinum, er spenningurin um tað ókenda stórur. Tú kennur onkran ella stuðlar onkrum, sum er valevni, og tá er áhugavert at fylgja við, hvussu leikur fer. Velur tú bara, tí tað er tín "skylda", er dagurin neyvan so nógv øðrvísi enn aðrir dagar.

Situr tú í valnevnd í eini miðalstórari kommunu, møtir tú nógvum fólki ein slíkan dag. Høvið er eisini til prát millum valnevndarlimir um leyst og fast, tá ið steðgur er, og tað er ikki so sjáldan, at tey, sum koma inn at velja, hava okkurt at siga eftir, at atkvøðuseðilin er potaður niður í kassan.

Aksel Olsen, sum er 91 ára gamal og fyllir 92, 25. august komandi ár, var elsti veljari, sum greiddi atkvøðu á valstaðnum í Nes kommunu týsdagin.

Aksel segði seg ikki hava so ógvuliga stóran áhuga fyri kommunuvalinum, men helt, at løgtingsvalini eru meira spennandi enn kommunuvalini.

91 ára gamli toftamaðurin er byrgur, hóast høga aldurin. Minnið er gott, og hann veit ein hóp at siga frá. Eyguni halda sær væl, og hann hevur nýliga endurnýggja sýnsroyndina og koyrir bil, tá ið tað passar honum.

- Sum ungur ætlaði eg mær á sjómansskúla, men stóð ikki sýnsroyndina. Tí valdi eg maskinarbeiði, sigur toftamaðurin.

Aksel er ein áhugaverd søga. Sum 9 ára gamal var hann fyrsta túrin á Suðurlandinum, og mistaki eg meg ikki, var hann millum teir seinastu, sum sóu sluppirnar, Emmanuel og Lauru, sum fórust í 1932 – við mann og mús.

Aksel var væl fyri og í góðum hýri valdagin.

Høgi aldurin sigur, at tað er avmarkað, hvussu ofta tú sleppur at velja aftrat, tá ið val er fjórða hvørt ár – og bert hálvt nýggjunda ár resta í tey fyrstu 100!

# Stór útskifting í Nes kommunu



*Enn einaferð var Súni í Hjøllum toppskorari og fyrstvaldur á almenna listanum við 60 atkvøðum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Marjun Gaardbo, sum hevur verið borgarstjóri seinastu fýra árini, stillaði uppaftur. Í staðin fyri Marjun og Katrin, eita umboðini nú Helen og Elin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Ólavur Magnussen er formaður í valnevndini fyri Nes kommunu. Hetta álitisstarv røkir hann fyrimyndarliga*

*Mynd: Vilmund Jacobsen 9*

**Bert tveir av sjey bygdaráðslimum í Nes kommunu eru við til at manna bygdaráðið, sum nú er valt, harav tvær aðrar kvinnur enn tær, sum sótu í undarfarna bygdaráði**

KOMMUNUVALIÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Súni í Hjøllum og Símun Johannesen eru teir einastu, sum eru eftir av gomlu "garduni" í Nes kommunu. Á valinum týsdagin fullu Haldur Vang og Jan Danielsen og Marjun Gaardbo, Katrin Poulsen og Eyðfinn Olsen lótu seg ikki stilla uppaftur.

Tríggir listar vóru til valið hesaferð. Almenni listin (listi A) fekk trý umboð; Súni í Hjøllum, sum varð fyrstvaldur við 60 atkvøðum, Símun Johannesen (53) og Petur J. Petersen (43). Listi B (Kvinnulistin) fekk tvey umboð; Helen H. Jacobsen (34) og Elin á Torkilsheyggi (32). Listi C fekk eisini tvey umboð; Petur í Túni (31) og Eyðfinn Johannesen (29), sum vann lutakastið við Mortan Højgaard, ið eisini hevði 29 atkvøður.

Tilsamans fekk listi A 343 atkvøður, listi B (Kvinnulistin) 179 og listi C 203 atkvøður.

Hetta merkir, at umboðini á lista A eru lutfalsliga "dýr" í mun til umboðini á hinum báðum listunum.

Sum heild kann sigast, at almenni listin, sum plagar at fáa nógv tær flestu atkvøðurnar, viknaði nakað í mun til hinar báðar.

Hetta er samstundis fyrstu ferð, at kvinnulistin, sum nú hevur fleiri ár á baki í Nes kommunu, hevur fingið tvey umboð.

Á seinasta vali varð Katrin Poulsen vald á kvinnulistanum, meðan Marjun Gaardbo, sum seinastu fýra árini hevur verið borgarstjóri, varð vald á almenna listanum.

Ilt er at meta um, hvør komandi borgarstjóri í Nes kommunu verður, men sambært valúrslitinum situr Súni í Hjøllum við teimum bestu kortunum sum fyrstvaldur á almenna listanum.

Luttøkuprosentið í Nes kommunu var umleið 86% í mun til 82,8% á seinasta bygdaráðsvali.



*Valið er av, atkvøðuseðlarnir eru taldir, og gerðarbókin er skrivað og undirskrivað. Á myndini er valnevndin í Nes kommunu saman við hjálparfólki*

*Mynd: Marjun Gaardbo*



# Rodmundur Nielsen er ovfarin

**- Eg taki hetta sum eina dygga álitisváttan til mín og undanfarna býráð eftir stóru avgerðirnar, sum tiknar eru í farna valskeiði, sigur Rodmundur Nielsen, ið heldur fram sum býráðsformaður, um tað stendur honum í boði**

KOMMUNUVALIÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Rodmundur Nielsen, sitandi borgarstjóri í Runavíkar kommunu, var tann stóri sigurðsharrin á valinum við ikki færr enn 399 persónligum atkvøðum. Hetta eru heili 265 atkvøður fleiri, enn hann fekk á seinasta vali.

- Eg eri ovfarin av valinum, og eri sera takksamur fyri tað álit, sum veljarin hevur sýnt mær. Einsamallur gert tú einki, og tí er hetta ein álitisváttan til mín, men ikki minst til tað arbeiði, sum gjørt hevur verið í býráðnum farna valskeið, sigur ein fegin, Rodmundur Nielsen.

Sum skilst, hevur einki valevni í Runavíkar kommunu áður fingið nær námind av tí atkvøðutali, sum borgarstjórin fekk á valinum týsdagin.

Tríggir av limunum í gamla býráðnum fullu á valinum hesaferð. Tey eru Ragnar Olsen, Sæunn Ó. Hansen og Marja Lamhauge.

Hans Tausen Olsen, sum hevur sitið í Runavíkar býráði í fleiri setir, var tann einasti, sum ikki læt seg stilla uppaftur.

Níggju fólk mannaðu gamla býráðið í Runavíkar kommunu, men nú tríggjar aðrar kommunur, Skála kommuna, Oyndarfjarðar kommuna og Elduvíkar kommuna, leggja saman við Runavíkar kommunu, verður talið av býráðslimum 11.

Nývald á Runavíkarlistanum, lista A, eru Regin Jacobsen (150) og Kristian Gardbo (71).

Ragnar Olsen fall sum nevnt á Søldarfjarðar-listanum, lista C, og í hansara stað varð valdur, Ólavur A. Olsen (119).

Á Skála-listanum, lista B, sum eisini fevnir um Oyndarfjørð, Elduvík og Funningsfjørð, verða trý umboð í nýggja býráðnum. Toppskorari var Kári Johannesen (96), og síðan stóð á jøvnum millum trý valevni, sum lutakast verður um eftir fínteljingina. Teir tríggir, sum allir høvdu 82 atkvøður í part, eru: Tummas M. Jacobsen, Asbjørn Mikkelsen og Klæmint Østerø.

Rodmundur Nielsen sigur, at nýggja býráðið verður kallað saman, tá ið tað endaliga er valt, og í gjáramorgunin segði hann seg vóna, at tað ikki ganga nógvir tímar, til fínteljingin fyriliggur og lutakast hevur verið um teir tríggjar á Skála-listanum.

Tey 11, sum koma at manna Runavíkar býráð, verða: Rodmundur Nielsen (A, 399), Regin Jacobsen (A, 150), Regin Olsen (A, 105), Hans Petur Ellingsgaard (A, 97), Hans Jacob Lamhauge (A, 90), Kári P. Højgaard (A, 72)), Kristian Gaardbo (A, 71), Kári Johannesen (B, 96), Ólavur A. Olsen (C, 119) og so tveir av teimum trimum, Tummas M. Jacobsen, Asbjørn Mikkelsen og Klæmint Østerø (B, 82).



*- Einsamallur gert tú einki, og tí er hetta ein álitisváttan til mín, men ikki minst til tað arbeiði, sum gjørt hevur verið í býráðnum farna valskeið, sigur ein fegin, Rodmundur Nielsen*

*Mynd: Jonhard Hammer*



*Regin Jacobsen er nývaldur á Runavíkar-listanum, lista A, við 150 atkvøðum. Nývaldur á listanum er eisini Kristian Gaardbo (71)*

*Mynd: Jonhard Hammer*

# Dánjal Andreasen dygga undirtøku

KOMMUNUVALIÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í Leirvíkar kommunu var bert ein listi til valið hesaferð. Tilsamans 10 valevnir vóru á listanum. Ovastur endaði Dánjal Andreasen við ikki færri enn 88 atkvøðum, ið má sigast at vera eitt ógvuliga gott val og stór álitisváttan.

Atkvøðurnar fullu annars soleiðis: Listin (4), Dánjal Andreasen (88), Fríðgerð Heinesen (66) Poul Andrias Joensen (64), Ólavur Sjúrðarberg (60) Jóhan Christiansen (58), Joen Magnus Rasmussen (56), Randi í Jógvanstovu (50), Allan Norðgerð (41), Hansa á Húsamørk (32) og Jan Dam Vang (22).

Sjey av teimum, sum høvdu flestar atkvøður, manna nú bygdarráðið í Leirvík; tey eru Dánjal, Fríðgerð, Poul Andrias, Ólavur, Jóhan, Joen Magnus og Randi.

Sjúrður Eliasen, sum var borgarstjóri í undanfarna bygdarráði, stillaði ikki uppaftur á valinum hesaferð. Tað gjørdu Tórhild Bjarkhamar, Guðrið Lava Olsen og Tummas Justinussen heldur ikki.

Á valinum seinast varð Sjúrður Eliasen valdur við 92 atkvøðum.

### Ovfarin

Í stuttari viðmerking, sigur Dánjal Andreasen, sum nú varð fyrstvaldur á listanum, at hann er ovfarin av valinum og tí dygga stuðli, sum leirvíkingar hava veitt honum.

- Eg eri sera takksamur fyri hetta stóra álit, sigur hann.

Dánjal var uppstillaður til kommunuval í Leirvík einaferð í áttatiárunum, men hetta er fyrstu ferð í nógv ár, at hann hevur verið á lista til bygdarráðsval.

*- Eg eri rættiliga ovfarin og sera takksamur fyri hetta stóra álit, sigur Dánjal Andreasen, sum varð fyrstvaldur í Leirvíkar bygdarráð. Her avmyndaður saman við konuni Hannu*

*Mynd: Jonhard Hammer*

